# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fiat-fjepparar vitjaðu Føroya Ellisakfør




*Jørgen Mikkelsen frá »Fiat Mini Klub Sjælland« handar her eitt skelti við áskriftini »Jeg er Fiat-fan, hva´ fan er du..« til Páll Danielsen frá Føroya Ellisakførum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Hóskvøldið 8. juni vitjaðu donsku Fiat-fjeppararnir frá »Fiat Mini Klub Sjælland« hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond og í gamla vatnbrunninum við Gráastein, har nógv ellisakfør standa**

### ELLISAKFØR

Tað eru ivaleyst mong sum minnast at Fiat-bilar í 70- og 80-unum koyrdu við merkjum við áskriftini »*Jeg er Fiat-fan, hva´ fan er du..*« Hetta var í eini tíð, tá Fiat var eitt av mest seldu bilmerkjum í Føroyum.

Hóskvøldið vitjaðu donsku Fiat-fjeppararnir frá "Fiat Mini Klub Sjælland" hjá Føroya Ellisakførum. Í hesum sambandi fekk felagið eitt slíkt Fiat-fan skelti sum gávu frá "Fiat Mini Klub Sjælland". Tey vitjaðu í felagshølunum yviri við Strond og í gamla vatnbrunninum við Gráastein, har nógv ellisakfør standa.

Ferðalagið upp á 14 fólk, hava ferðaðst kring landið við teimum sjey gomlu Fiat-bilunum. Tey vitjaðu í Suðuroy, Sandoy, Eysturoy, Norðoyggjum og í Vágum.

Tey eru sera væl nøgd við túrin í Føroyum. Smáu Fiat-bilarnir vaktu stóran ans, allastaðni har tey komu, og tey komu í samband við nógv fólk.

Bilarnir fóru av landinum við Norrønu fríggjamorgunin og tey flestu í ferðalagnum fara við flogfari leygardagin.



Tórshavnar Bátafelag:

## 20 limir tikið trygdarskeið



*Limir í Bátafelagnum sum hava tikið trygdarskeið fyri smábátar. Her eru tey saman við Leivi Hansen, formanni í havnanevndini hjá Tórshavnar býráð, og Mariusi Magnusson, leiðara á Trygdarmiðstøðini*

Mikukvøldið 7. juni var ein lítil samkoma hjá Tórshavnar Bátafelag í Vágsbotni í Havn. Orsøkin var, at 20 limir frá felagnum høvdu tikið trygdarskeið fyri smábátar. Skeiðið er komið í lag eftir at Trygdarmiðstøðin í Klaksvík og Bátafelagið høvdu tosað saman um evnið "Trygdin í hásæti", og um hvussu hetta kann gerast best.

Úrslitið av hesum varð so eitt átta tíma langt skeið, fordeilt upp á tvey kvøld.

Elimentini í skeiðnum eru: Hjálp, Eldsløkking, Nýtsla av gummibáti og Praktisk trygdarviðurskiftir umborð. Skeiðið er praktiskt relaterað t.v.s., at nógvar venjingar eru knýttar at skeiðnum

Hetta kvøldið var ein gummibjargingarbátur lutaður burtur. Hepni vinnarin gjørdist Sunrid Torvadal. Leivur Hansen, formaður í havnanevndini hjá Tórshavnar býráð, var komin til at draga lut um bátin, ið var givin av Gummibátatænastuni..

Næsta skeið verður – um nóg nógv tekna seg 19. og 20 juni . Bæði kvøldini verður byrja kl 18. Pláss er fyri 10 luttakarum í senn, sigur Marius Magnusson, leiðari á Trygdarmiðstøðini. Tekning fer fram við at senda e-mail til: seasafe@seasafe.fo

Tey sum fingu prógv vóru: Kartni Olsen, Tórshavn, Alvi Nielsen, Hoyvík, Jógvan Bæk, Argir, Johannes T. Johannesen, Tórshavn, Øssur Hjalt, Tórshavn, Jóanes Joensen, Tórshavn, Kristian Glerfoss, Argir, Petur M. Jensen, Tórshavn, Anfinn Norðfoss, Tórshavn, Árni Sørensen, Argir, Jónhild Tummasardóttir, Argir, Olav A. Olsen, Vestmanna, Rógvi Højgaard, Hoyvík, Tórhild Thomsen, Hoyvík, Hans A. Højgaard, Tórshavn, Una Højgaard, Tórshavn, Leivur R. Torvadal, Hoyvík, Sunrid Torvadal, Hoyvík, Frits Jacobsen, Kollafjørður, og Elsa Nielsen, Kollafjørður.

## Thomas Dam formaður í Heimamissiónini

Á høvuðsstýrisfundi mikudagin 7. juni 2006 varð Thomas Dam á Toftum valdur til nýggjan formann í Heimamissiónini.

Í apríl mánað boðaði formaðurin seinastu 5 árini, Bergur D. Joensen frá, at hann fór úr høvuðsstýrinum 1. juli og við hesum eisini frá sum formaður.

Thomas Dam hevur sitið í høvuðsstýrinum fyri Kirkjuligu Heimamissiónina síðani 1993, seinasta árið sum næstformaður. Thomas Dam byrjar sum formaður 1. juli 2006.

Á fundinum varð Hilmar Danielsen, Klaksvík, valdur til næstformann og

Leo-Hans Mikkelsen, Sørvágur, til 2. næstformann.



*Thomas Dam á Toftum er valdur til nýggjan formann í Heimamissiónini*

Móttøka

Í sambandi við at Torleivur Hoydal skipaeftirlitsmaður fer frá við eftirløn, verður boðið til almenna móttøku á Hotel Hafnia hin 16. juni frá klokkan 1500 til 1800.

Torleivur hevur fingist við skipaeftirlit í 31 ár, fyrst hjá Statens Skibstilsyn, sum seinni broytti navn til Søfartsstyrelsen. Eftir at trygd á sjónum varð yvirtikið helt Torleivur áfram at starvast fyri Skipaeftirlitið til nú, hann fer frá við eftirløn.

**Skipaeftirlitið**